# Nú er tað upp til Jákup at taka støðu

**Venjarin hjá Partick Thistle vil fegin hava føroyska landsliðsmálverjan á lønarlistan, og tað kann væl vera, at tað fer at enda við, at Jákup Mikkelsen skrivar undir, men tað er ikki bara bara**

SÁTTMÁLASAMRÁÐINGAR
*Jóannes Hansen*



*Partick Thistle vil gjarna hava Jákup Mikkelsen á lønarlistan, men enn hevur hann ikki tikið endaliga støðu til, um hann fer at spæla í skotsku Premier League komandi kappingarár*
*Savnsmynd*

Tað er góður møguleiki fyri, at Jákup Mikkelsen fer at halda fram við lívinum sum fulltíðar yrkisspælari í fótbólti. Sum tað varð nevnt í blaðnum í síðstu viku, so hevur Jákup hesar seinastu dagarnar verið í Skotlandi, har hann hevur vant og spælt venjingardystir við Partick Thistle, sum síðsta kappingarár endaði miðskeiðis í bestu deildini.

Sambært skotskar fjølmiðlar, so hevur venjarin hjá Partick Thistle verið rættuliga væl nøgdur við tað, sum Jákup hevur avrikað, síðani hann hósdagin kom til Glasgow, har felagið hevur heimstað, og James Grady, sum er ein av álopspælarunum í felagnum, segði seg í vikuskiftinum inniliga vóna, at sáttmáli fór at spyrjast burturúr. Sunnudagin segði hann soleiðis við Daily Record:

–Jákup hevur bara verið her í nakrar heilt fáar dagar, og hann hevur víst seg serliga stinnan, bæði undir venjing og í venjingardystinum, sum vit leygardagin vunnu 4–2 ímóti eingilska Bradford City.

Saman við Jákupi Mikkelsen hevur franski vongverjin Hean–Yves Anis verið og royndarvant í hesum felagnum. Nógv bendir á, at hann eisini fer at fáa sáttmála við felagið í Glasgow, og sambært omanfyri nevnda álopsspælara, so eru tað onnur viðurskifti enn sjálvt fótbóltsspælið, sum tað skal arbeiðast mest við hjá teimum báðum nýggju spælarunum:

– Fransmaðurin dugir púrasta einki eingilskt. Jákup er frægari, men enn hevur hann verið rættuliga kúrrur, men tað fer vónandi ikki at ganga ov long tíð, áðrenn hann verður førur fyri at samskifta á serligu dialektini, sum vit brúka her í Glasgow, segði James Grady sunnudagin við Daily Record.

## Familjan og fótbólturin

Jákup Mikkelsen hevur verið væl nøgdur við tað, sum hann higartil hevur verið vitni til í Partick Thistle:

–Mær hevur dámt venjingarnar væl, og eg var heilt ovfarin, tá ið vit leygardagin spældu venjingardyst. Eg hevði roknað við, at teir fóru at vera stórir, sterkir og bulmiklir spælarar, og at tað mesta fór at ganga fyri seg í luftini, men soleiðis var tað als ikki. Teir vóru lættbeintir og skjótir, og teir vístu fínt og hugflogsríkt fótbóltsspæl fram eftir jørðini.

Ætlar tú at skriva undir samstarvsavtalu við teir?

– Frá felagnum havi eg fingið at vita, at teir fegnir vilja hava, at eg skal spæla við teimum. Vit eru ikki lidnir við samráðingarnar enn. Stóri spurningurin hjá mær er, hvussu hetta skal ganga upp við familjulívinum. Konan, børnini bæði og eg komu mikudagin úr Molde og til Klaksvíkar. Hósdagin fór eg til Skotlands, og nú skal støða takast til hetta. Eg havi ikki enn fingið greiðu á, um familjan skal vera í Klaksvík, meðan eg royni meg her niðri, ella hvussu tað skal vera. Tað er ein nýggjur venjingardystur á skránni týsdagin. Teir vilja hava, at vit skulu skriva undir sáttmála, áðrenn tann dysturin verður spældur, men eg vil hava persónligu viðurskiftini upp á pláss, áðrenn nakað verður undirskrivað, sigur Jákup Mikkelsen úr Glasgow.

## Tosa um landsdystin

Í skotsku miðlunum hevur síðani Jákup Mikkelsen hósdagin kom til Glasgow verið gjørt rættuliga fitt burturúr, at tað er landsliðsmálverjin hjá Føroyum, sum nú er í Partick Thistle.

Lesararnir fáa at vita, at tað er rættuliga sannlíkt, at nýggi málverjin hjá felagnum seinni í ár skal verja føroyska málið, tá ið Skotland fer at fáa vitjan av Føroyum. Tað verður gingið høgt uppí, at Jákup ímóti Týsklandi fyrr í summar megnaði at halda tætt í næstan 90 minuttir, og at Rudi Völler á tíðindafundinum eftir dystin gav føroyska málverjanum so gott skoðsmál.

Skotland og Føroyar skulu spæla á Hampden Park í Glasgow leygardagin 6. september. Allir fótbóltshugaðir føroyingar minnast, at uppgerðin millum Føroyar og Skotland á Svangaskarði í fjør endaði 2–2. Ta ferðina var tað Jens Martin Knudsen, sum vardi føroyska málið. Tað hevur hann eisini gjørt hinar fýra ferðirnar, tá ið Skotland og Føroyar hava spælt saman í undankapping.

# FM í kasti

FRÆLSUR ÍTRÓTTUR
*Stefan í Skorini*

Frælsur Ítróttur Føroya skipar týsdagin og hósdagin fyri FM í kasti á kastivøllinum við Eysturskúlan í vikuni.

Týsdagin 22. juli verður kappast í hamarkasti og kúlustoyti. Byrjað verður klokkan 17 við hamarkasti hjá monnum og kvinnum. Hamarin hjá monnum vigar 7,26 kilo, og hjá kvinnum vigar hann 4 kilo.

Eftir kappingina í hamarkast verður farið undir kúlustoyti, sum eisini er fyri bæði menn og kvinnur. Kúlan hjá monnum vigar 7,26 kilo og hjá kvinnum er vektin 4 kilo eins og í hamarkasti.

Hósdagin verður diskokast og spjótkast. Byrjað verður klokkan 17 við diskokasti hjá monnum og kvinnum. Diskos hjá kvinnum vigar eitt kilo, meðan hann vigar tvey kilo monnum.

Síðani er spjótkast fyri bæði menn og kvinnur á skránni. Spjótið hjá kvinnum vigar 600 gramm hjá kvinnum og 800 gramm hjá monnum.

Tilmelding er á staðnum báðar dagarnar. Bara limir í feløgunum Bragdinum, Roysninum og Treystinum kunnu lutaka.



*Heri Ziska og aðrir kastarar fara týsdagin og hósdagin at kappast í FM í kasti. Kappingarnar eru týsdagin og hósdagin*
*Savnsmynd*



# HB dreingirnir hava ognað sær steypið

**Hóast VB í 2. hálvleiki eina løtu fekk HB aftur, so var fyri tað mesta lítil ivi um, at steypið skuldi vera eftir í høvuðsstaðnum**

KOYRISKÚLASTEYPIÐ
*Jóannes Hansen*



*HB dreingir. Steypavinnarar 2003. Standandi frá vinstru.: Tróndur Kragesteen, Jákup Larsen, Christian Mouritsen, Jónas Stenberg, Jákup Slættalíð, Bárður Mittelstein, Pætur Jørgensen, Poul K. Dam, Gunnar Haraldsen, Pætur Clementsen. Húkandi frá vinstru: Jóhan P. Holm, Poul T. Dam, Birgir Poulsen, Hanus Samró, Niclas Eysturoy, Ingvard Vang, Dánjal Davidsen og Ólavur í Ólavsstovu.*
*Mynd: www.hb.fo*

HB hevur altíð borið orð fyri at vera steypaliðið fram um øll hini, og tølini vísa eisini, at soleiðis er tað. Í fjør eydnaðist tað kortini HB ikki at vinna nakra steypakapping. Hetta var fyrsta ferðin nógvu tey seinastu árini, at HB yvirhøvur ikki taldist millum steypavinnararnar.

Nú er greitt, at talan ikki verður um endurtøku av soltna steypaárinum í fjør hjá HB. Leygardagin 28. juni vann HB finaluna í steypakappingini í dreingjadeildini. Finalan var ímóti VB, og hon varð spæld á Argjum. Úrslitið í góðum fótbóltslíkindum og tjúkkum mjørka (tað kennist næstan sum um mjørkin ikki hevur lætt hesar seinastu fýra vikurnar!) var 5–2.

HB dreingirnir vóru ídnir og nærlagdir, og serliga í 1. hálvleiki, tá ið teir løgdu seg á odda 2–0, spældu teir væl. Málini skoraðu Jákup Larsen og Christian Mouritsen.

Í fyrra umfarinum hevði tað ikki verið nógv, sum hevði bent á, at VB, sum onga roynd hevði havt ímóti HB málinum, skuldi hótta leiðsluna hjá havnarmonnunum. Men eftir steðgin kom VB meiri við, og brádliga var spenningur í aftur. Kanska tóku HB spælararnir sær eitt sindur av løttum, nú teir mundu halda sigurin vera vísan. Tað var kortini skjótt, at teir funnu út av, at teir høvdu roknað uttan at hava hugsað um sera kvika og evnaríka álopsspælaran Lukasz Cieslewicz, sum man vera sonur Robert, ið áður hevur spælt við VB, og sum nú er spælandi venjari hjá Sumba í 2. deild.

Tvær ferðir rann Lukasz frá HB verjuni og setti bóltin í málið. So var 2–2, og HB var ikki so lítið skelkað. VB hóttanin gjørdist kortini ikki til sigur. Seinna partin av seinna umfarinum skoraði HB trý mál afturat, og allar tríggjar ferðirnar, var tað sera evnaríki Christian Mouritsen, sum var málskjútti.

## Tøtt hálvfinala

Sum í eitt nú smádreingjadeildini, so var steypakappingin í dreingjadeildini skipað í fýra bólkum. Teir fýra vinnararnir spældu hálvfinalu fríggjadagin 27. juni. VB vann 5–3 ímóti NSÍ, sum var steypavinnari í 2002, og HB var partur í sera spennandi uppgerð ímóti grannunum í B36.

Talan var um satt drama, sum endaði soleiðis, sum tað so ofta hevur gjørt, tá ið HB og B36 takast. Eftir vanliga leiktíð var 1–1, og so var neyðugt við brotssparkskapping. B36 megnaði ikki at fáa nakað av trimum teimum fyrstu spørkunum í málið, og tá ið HB hevði skorað allar tríggjar tær fyrstu ferðirnar, var tað greitt, at HB enn eina ferð var endað omaná í kapping úr ellivu metrum ímóti B36.

Eftir finalusigurin á VB handaði formaðurin í kappingarnevndini hjá FSF, Karl Vidtfeldt, HB steypið. Tað verður kallað Koyriskúlasteypið, tí tað er Klaksvíkar Koyriskúli, sum hevur latið steypið at kappast um.

Steypið var latið í 1995, og hetta var fimta ferðin, at HB vann tað. Sostatt varð tað hesa ferð vunnið til ognar. HB hevur eisini vunnið tað í 1998, 1999, 2000 og 2001. B36 vann tað í 1995 og í 1996, MB í 1997 og NSÍ í 2002.

HB spælarunum og felagnum verður ynskt hjartaliga tillukku við steypasigrinum.



# Lassin á Ólavsøku í stuttum buksum

**Eingin møguleiki er fyri, at tað skal ganga, sum tað hevur gjørt hinar báðar ferðirnar, tá ið Lassin hevur dømt finalur um Løgmanssteypið**

STEYPAFINALUR
*Jóannes Hansen*

Tað verður ein av royndastu dómarunum, sum skal halda skil á, tá ið B36 og GÍ Ólavsøkudag fara at takast um Løgmanssteypið. FSF hevur gjørt av, at Lassin Isaksen, sum er einasti føroyski altjóða dómarin, skal passa floytuna og skriviarbeiðið. Á linjunum fara at renna føstu hjálpardómararnir hjá Lassanum – í hvussu so er, tá ið tað ræður um at døma í Føroyum. Teir eru Jón Kári Frederiksen og Petur Hans Joensen. Fjórði dómari verður Dagfinn Olsen. Tað munnu neyvan fara at ganga fleiri ár, áðrenn hann fer at fáa uppgávuna inni á vøllinum.

Ein tann síðsta uppgávan, sum Lassin Isaksen hevur havt, var í Intertoto Cup kappingini fyri trimum vikum síðani. Tá var hann á Gamla Ullevi stadion í Göteborg, har Örgryte hevði heimavøll ímóti FC Vilnius. Heimaliðið vann 3–0. Saman við Lassanum vóru Tummas Pauli Olsen og Jens Albert Simonsen, sum saman við Jón Kári Frederiksen eru teir hjálpardómararnir úr Føroyum, sum standa á altjóða listanum.

Lassin Isaksen hevur tvær ferðir áður hildið skil á steypafinalum. Merkisvert hevur tað verið, at báðu ferðirnar var neyðugt við umdysti og nýggjum leikdegi, áðrenn tað var greitt, hvør skuldi vinna Løgmanssteypið. Soleiðis verður tað ikki um eina viku. Reglurnar vórðu broyttar fyri tveimum árum síðani, soleiðis at avgerðin skal fella beinanvegin, um tað so skulu longd leiktíð og brotssparkskapping til.

Fyrra ferðin, Lassin dømdi finaluna, var í 1993. Tá spældu B71 og HB. Í fyrru finaluni, sum var spæld 4. august, var úrslitið eftir longda leiktíð 1–1. So vóru B71, HB og Lassin aftur á ovara vølli í Gundadali 22. september, og tá bar til at vinna ein vinnara. B71 vann 2–1, og tað var landsstýrismaðurin í almanna málum, Páll á Reynatúgvu, sum skoraði sigursmálið.

Seinna ferðin, at Lassin dømdi finaluna, var í 1997. Tá spældu GÍ og HB. Talan var um størsta dramaið yvirhøvur í søguni hjá Løgmanssteypinum, sum gongur aftur til 1989. Sunnudagin 4. august endaði tað 2–2. Øll fýra málini vóðu skorað í tvær ferðir fimtan minuttir longdu leiktíðini.

Nýggj finala var 8. september, og tá var aftur neyðugt við longdari leiktíð, áðrenn GÍ hevði vunnið steypið. Tá ið vanliga leiktíðin var farin, var støðan 2–2, eftir at HB hevði verið á odda 2–0. Í longdu leiktíðini skoraði GÍ tríggjar ferðir, áðrenn HB pyntaði um, so endaliga úrslitið gjørdist 5–3.

Steypafinalan hjá kvinnum verður millum HB og KÍ. Í henni verður Rúni Gaardbo á Toftum dómari. Á linjunum fara at renna Jónleif Gerðisá og Jan á Líðarenda, sum tykist ætla sær at lyfta arvin eftir páppan, sum framvegis drívur á at døma. Fjóðri dómari verður Dia Lamhauge.s